# Spenningur til tað síðsta í Runavík



*Jens Martin Knudsen var hetjan hjá NSÍ í dystinum móti FS Vágum sunnudagin. Hann bjargaði trimum av fýra brotsspørkum í brotssparkskappingini. Her tekur hann næsta brotssparkið hjá FS Vágum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

**FS Vágar kann í stóran mun takka sær sjálvum fyri, at tað ikki eru teir sum skulu møta B68 í hálvfinaluni. Í avgerandi løtum kendu teir ikki sína vitjunartíð, hóast teir allan dystin spældu fult upp við favoritarnir úr Runavík**

Fáur uttanfyri vøllin og allarminst NSÍ-arnir inni á vøllinum, høvdu væntað, at teir skuldu koma aftur í dystin tá tað manglaðu 5 minuttir. Tá var støðan 3-1 til FS Vágar, og teir høvdu fult tamarhald á dystinum.

Men so fær NSÍ fríspark beint uttan fyri brotsteigin hjá FS Vágum. Brynjólvur Nielsen varð settur at skjóta, og hann sendi við einum sera vøkrum frísparki, bóltin beinleiðis upp í tríkantin.

Nú var bert eitt mál á muni, og burtur ur ongum var NSÍ inni í dystinum.

Teir settu nú allar kreftir inn, og í yvirtíðini eydnaðist tað Arnfinn Langgaard at seta høvdið á eftir horna, og tryggja NSÍ umdyst.

## Lívlig byrjan

Dysturin fekk annars eina lívliga byrjan, og tað var FS Vágar sum legði út við ágrýtnum spæli. Tað gingu bert 3 minuttir til hetta gav úrslit. Fríspark verður sent innfyri, og endar bólturin á høvdinum á Vlad Osipov og víðari inn í málið.

Vágamenn spældu væl hesa fyrstu løtuna. Bólturin var fluttur væl og teir bardust fyri hvørjum bólti. Teir vunnu eisini teir allarflestu nærdystirnir.

Tá 10 minuttir eru leiktir mundu vágamenn komið uppá 2-0. Kim Poulsen kom at standa púra leysur, men Jens Martin Knudsen, sum spældi ein góðan dyst, bjargaði.

Løtu seinni fekk NSÍ sín fyrsta møguleika. Eftir innlegg úr vinstru síðu, verður Kári Hansen leysur, men skýtur omanfyri málið.

Tað vóru nógvir málmøguleikar hesa løtuna, og kundu bæði liðini fingið fleiri mál enn tað eina, sum var komið higartil.

Tá hálvur tími er farin kemur næsta málið. Langur bóltur verður spældur fram í móti brotsteiginum hjá NSÍ, og har vinnur ein vágamaður bóltin ímóti NSÍ -verjuni. Bólturin kemur fyri føturnar á Kim Poulsen, sum fult uppiborið kundi leggja FS Vágar á odda 2-0.

Kim Poulsen var í fyrra hálvleiki ein støðug hóttan móti NSÍ verjuni, sum ikki virkaði serliga trygg.

## NSÍ við aftur

NSÍ fall tó ikki í fátt av hesum, men fingu móti endanum av fyrra hálvleiki lagt eitt ávíst trýst á FS Vágar. Tá 40 minuttir eru spældir, eydnast NSÍ umsíðir at fáa mál. Sonni L. Petersen kemur at standa fríur inni í brotsteiginum hjá FS Vágum, og skýtur bóltin í mál til 1-2.

Hetta var eisini hálvleiksstøðan, og NSÍ- viðhaldsfólkið hevði nakað at tosa um í góðveðrinum.

Ein hevði væntað, at NSÍ fór koma út til seinna hálvleik sum eitt ódnarveður og leggja stórt trýst á FS Vágar, samstundis sum vágamenn fóru at møðast av tí høgu leikferðini sum var í fyrra hálvleiki. Men soleiðis bleiv als ikki. Fyrstu helvt av seinna hálvleiki gekk javnt á, uttan at nakrir stórir málmøguleikar spurdist burturúr.

Tá seinni hálvleikur er hálvrunnin dømir Oddmar Andreasen brotspark til FS Vágar. Jens Erik Rasmussen skorar trygt og nú var 3-1.

NSÍ-arnir vóru skelkaðir, og megnaðu púra onki næstu løtuna. Vóru vágamenn neyvir, kundu teir avgjørt dystin. Jens Erik slapp leysur í vinstru síðu, og legði innfyri til ein púra frían John Johansen, men hann brendi.

Sum tíðin gekk trekti FS Vágar seg longur aftur á vøllin. NSÍ tók nú yvir tað sum eftir var, og teir komu eisini fram til rímuliga stórar málmøguleikar.

Men tíðin gekk og tað sá meira og meira út til at FS Vágar skuldi klára at halda tørn. Men seinastu minutt-irnar fekk NSÍ 2 mál, sum tryggjaðu teimum umdyst.

Í umdystinum komu ikki fleiri mál og tí varð neyðugt við brotspørkum. Jens Erik skoraði tað fyrsta hjá FS Vágum, men tá so Jens Martin bjargaði teimum næstu trimum, kundi NSÍ fara avstað við sigrinum.

FS Vágar vísti, at teir hava tilfar til at gera seg galdandi í 2. deild í ár, og vóru teir neyvir í avgerandi løtum kundi teir vunni dystin. NSÍ hevði eisini málmøguleikar til fleiri mál, men tá teir ikki skoraðu lá vegurin opin fyri FS Vágum. Teir megnaðu tó ikki at brúka henda møguleikan.

### Dysturin í tølum:

**NSÍ - FS Vágar 6-4 (eftir brotsparkkapping)**

Vanlig leiktíð: 3-3 (1-2)
0-1: Vlad Osipov
0-2: Kim Poulsen
1-2: Sonni L. Petersen
1-3: Jens Erik Rasmussen (brotspark)
2-3: Brynjólvur Nielsen
3-3: Arnfin Langgaard


Bil á valstaðið

Veljarir, sum hava brúk fyri at verða koyrd á valstaðið, kunna ringja

tlf. 310448 valdagin

Suðurstreymoyar Javnaðarfelag



Ábyrgdar starvsfólk
til Hornið í SMS

Hornið í SMS sóknast eftir starvsfólki at byrja skjótast tilber.

Arbeiðstíðin er sett til 30-35 tímar um vikuna í dagtímunum, har uppgávan verður at hava ábyrgdina á ávísum økjum, søla og uppfylging.

Vit kunnu bjóða tær eitt spennandi og ábyrgdarfult starv við møguleikum til eitt fulltíðarstarv. Løn sambært galdandi sáttmála.

Umsóknir skulu sendast til Hornið innan 6. mai 2002.
Nærri fæst at vita um starvið við at seta seg í samband við Jan Djurholm.

HORNIÐ
Hornið • Postboks 1069 • 110 Tórshavn • Tel 31 50 10




# Nógvir nýggir bátar

**Kappróðrarfólk kring landið eru farin undir fyrireikingarnar til stevnurnar, sum standa fyri framman. Nógvir nýggir bátar vórðu flotaðir Flaggdagin, og vit hava fingið myndir av nøkrum teirra**

KAPPRÓÐUR
*Stefan í Skorini*

Fyri at vera við í oddinum í føroyskum kappróðri er neyðugt at skifta bátarnar út viðhvørt. Nógvir nýggir bátar hava verið at sæð seinastu árini og í ár er einki undantak.

Flaggdagin 25. apríl er vanligt at bátarnir verða flotaðir kring landið. Hetta var soleiðis fyrstu ferð, at fleiri av nýggju bátunum vórðu royndir undir venjing.

Hetta verður onkuntíð hátíðarhildið, og fleiri kappróðrarfelag hava valt at hava eitt lítið hátíðarhald í sambandi við, at bátarnir verða flotaðir.

Argja Róðrarfelag hevði aðalfund herfyri, og felagið boðaði eftir fundin frá, at tað miðvíst arbeiðir við at fáa nýggjar bátar til vega.

8-mannafarið Argjabáturin er flaggskipið hjá Argja Róðrarfelag, og manningin hevur nú fingið ein nýggjan bát til komandi kappingarár. Næsta ár verður 5-mannafarið Lómur eisini skiftur út við nýggjan bát.

Eitt annað nýtt 8-mannafar verður eisini at síggja til stevnurar í ár. Tað er Kvívíkingur, sum eisini er eitt nýtt far. Kvívíkingar vóna, at hetta kanska kann geva teimum betri úrslit í ár.

Havnar Róðrarfelag hevur eisini latið byggjað ein nýggjan bát. Tað er 6-mannafarið Sílið, sum er nýggjasti báturin hjá felagnum.

Í Klaksvík hava tey fingið tveir nýggjar bátar. Annar er 5-mannafarið Tekla, sum enn ikki er heilt liðugt, og hin er 10-mannafarið Klaksvíkingur, sum longu er flotaður.



*Nakað av fólki var komið oman at síggja nýggja Argjanbátin, sum varð flotaður Flaggdagin 25. apríl*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Nýggja 5-mannafarið hjá Klaksvíkar Róðrarfelag Tekla er um at vera liðugt. Felagið hevur eisini fingið nýtt 10-mannafar, sum er Klaksvíkingur*

*Mynd: Solby A. Eliasen*



*Nýggja 6-mannafarið Sílið varð eisini flotað Flaggdagin. Her er tað kvinnumanningin, sum venur*

*Mynd: Álvur Haraldsen*



*Kvívíkingar hava eisini fingið nýggjan bát*

*Mynd: Jens Kr. Vang*